JAVNSTØÐUNEVNDIN

# ÁRSFRÁGREIÐING 2005

Árið 2005 var trupult og umskiftandi hjá Javnstøðunevndini.

Nevndin noyddist at siga frá sær at vera vertur fyri árliga norðurlendska fundinum fyri javnstøðuumboð/nevndir. Hetta var orsakað av, at Javnstøðunevndin sjálv hevði sera avmarkaða játtan, at viðkomandi aðalráð ikki kundi stuðla, umframt at serfrøðin metti tað ikki heimilað sambært játtanarskipanini at søkja um stuðul til tiltøk hjá Javnstøðunevndini (Seinni er tó staðfest, at grønlenska Javnstøðunevndin fíggjar týðandi part av virksemi sínum við stuðli frá grunnum o.t.).

Forkvinnan Annika Wardum Joensen gjørdi av vegna tað, ið hon metti vera væntandi stuðul frá politisku skipanini, at siga seg úr nevndini.

Í august mánaði tilnevndi Hans Pauli Strøm landsstýrismaður Kára á Rógvi nýggjan forman í nevndini. Í samband við tilnevningina og á fundi við aðalráðið stutt eftir, tryggjaði nýggi formaðurin sær lyfti um, at Almanna- og Heilsumálaráðið fór at stuðla Javnstøðunevndini við skrivstovuumstøðum, eisini tænastum í samband við post, telefon, flytingar og heimasíðu. Eftir uppskoti frá landsstýrismanninum var Lisbeth L. Petersen við á fundi sum komandi forkvinna í nevndini viðvíkjandi kvinnuleikluti í politikki, ið sett var sambært løgtingssamtykt og samtykt í tingmannaráði útnorðurs. Tá henda seinna tilnevningin var komin í lag, fór Javnstøðunevndin saman við Lisbeth L. Petersen undir at lýsa eftir skrivara um ársskiftið 2006; ætlanin var at nevndirnar í felag skuldu seta og fíggja skrivaran.

Eftir formansskiftið fór nevndin eisini alt fyri eitt undir at fyrireika nýggja heimasíðu. Til bar at fáa ódýra loysn í lag við at knýta síðuna at loysnini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum.

Nevndin var umboðað á fundi í rættarnevndini, tá nevnda løgtingsmál um at seta nevnd at kanna kvinnuleiklut í politikki var fyri á løgtingi.

Nevndin svaraði eisini einstøkum fyrispurningum um nevndarsamansetingar sambært § 8 í ljavnstøðulógini. Hesar verða nærri lýstar á heimasíðuni hjá nevndini.

Nevndin tók ongi mál upp sjálv og hevði hvørki umstøður at gera stórvegis við ráðgeving ella almenn tiltøk. Men ætlanir vórðu lagdar um økt og miðvíst arbeiðið í 2006, ikki minst í samstarvi við leiklutsnevndina.

Nevndin varð tó órógva í desember 2005, tá útvarpið bar tey tíðindi, at javnstøðulógin sum málsøki og harvið Javnstøðunevndin varð flutt frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum til landsstýrismannin í vinnumálum. Hetta tykist vera hent eftir ynski frá leiðsluni í stjórnarráðnum, men Javnstøðunevndin er ikki hoyrd um henda spurning og fekk ongar grundgevingar í stuttorðaðu almennu fráboðanini dagfestari 31. desember 2005. Í samrøðu við Dimmalætting er løgmaður endurgivin fyri at tengja flytingina at teimum nevndum, ið Vinnumálaráðið varðar av; nevndin tekur ætlandi hesar nevndir upp sum innkomið mál.

Játtanin hjá nevndini var eyðvitað langt frá uppbrúkt fyri árið 2005.